


# Viðmerkingar til:
# "Frágreiðing og tilmæli í samband við stovnsetan av granskarapark"

**Magnus Danielsen**




NVD*Rit* 2005:16

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Faculty of Science and Technology University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Viðmerkingar til :**

# "Frágreiðing og tilmæli í samband við stovnsetan av granskarapark"

Høvundar / Authors **Magnus Danielsen**

Ritslag / Report Type *Upprit/Notes*

NVD*Rit* 2005:16
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin
ISSN 1601-9741
Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

**Viðmerkingar til :** **"Frágreiðing og tilmæli í samband við stovnsetan av granskarapark"**

15.juni 2005 Magnus Danielsen, Ph.D., Cand.Polyt, Professari í ravmagnsverkfrøði, Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya

## Inngangur og samandráttur

1. Tað er sjáldsamt í føroyskum politikki, at ein so positivur politiskur vilji til gransking, menning og gagnnýtslu av vísindaligum úrslitum í vinnulívinum vísir seg soleiðis, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur gjørt seg til talsmann fyri. Tí eigur hesin viljin at fáa eitt positivt mótspæl í vón um, at úrslitið verður ein mennandi gongd bæði í vinnu- og vísindahøpi. Vónandi myndar hetta eina byrjan til hugburðsbroyting til at vilja áhaldandi útbyggja vísindi sum neyðugt støði undir vinnuni.

   Landsstýrið setti ein stýribólk at gera eitt tilmæli um granskarapark. Hann hevur latið úr hondum "Frágreiðing og tilmæli í samband við stovnsetan av granskarapark"

2. Frágreiðingin, ið kom burturúr, er mangulfull bæði, hvat viðvíkur visión, vali ella prioritering av granskingarøki og organisatión. Fokuserað verður einsíðugt á bert eitt modell, ið harumframt meira ella minni er kopierað uttan at taka atlit fyri serligum føroyskum viðurskiftum, fyrst og fremst teimum viðurskiftum, at fáir granskarar eru, og at teir, sum eru, eru ikki tiknir við í prosessina.

3. Granskingarøkið, sum mælt verður til, er einsporað tikið úr lívfrøðini uttan atlit fyri, at ein diskussión um, hvat er relevant í føroyskum samanhangi, vildi verið týdningarmikil, hóast lívfrøðin sjálvsagt kann vera viðkomandi sum ein partur av teimum møguleikum, ið kunnu vera. Hetta er helst eisini ein fylgja av tí stýringsbólki, sum settur varð at viðgera málið, har bert fakfólk við lívfrøðiligari bakgrund (Pál Weihe, medicinari, Marita Rasmussen, fiskivinnufrøðingur, Bjørn Harlou djóralækni) vóru við, umframt starvsfólk úr fyrisitingini (Eyðun Jacobsen, Jóan Petur Hentze, Eyðun Højgaard og Maria Róin).

4. Eingin grundgeving er givin fyri, hví júst tað lívfrøðiliga og serliga gentøkni verður prioriterað sum tað einasta fram um øll onnur fakøki. Tað er heldur ikki greitt, hví tað er so neyðugt at byggja hús áðrenn ítøkilig gransking er eyðmerkt at skula fara fram. Hetta kundi ført til, at hús verða bygd, men uttan gransking av nøkrum týdningi.

5. Sambært royndum aðrastaðni er ivi, um samarbeiði og synergi kann verða skapt í nóg stóran mun av hesum slag av granskarapark. Í veruleikanum er vandi fyri at cementera og institutionalisera lágt samstarvsstig millum Fróðskaparsetur/vísindastovnar og vinnulív við granskaraparkini sum eitt eyka millumlið, ið skilir sundur.

   Harafturímóti eru granskaraparkir aðrastaðni, har universitetið sjálvt verður broytt og ment til sjálvt at vera ein virkin granskarapark og ein samarbeiðs- og synergiskapandi vísindalig eind við dyggum samstarvi við granskingarstovnar, haðani vinnulívið hevur møguleika fyri áhaldandi at fáa inspiratión úr tí vitannarstøði, sum skal til fyri at menna hana, umframt at geva universitetinum eina innspræning av inspiratión til at taka vísindatáttar upp, sum eru viðkomandi fyri vinnu og búskap landsins. Vinnulívinum skal gerast møguligt at menna verkætlanir á universitetinum í hóskandi samstarvi við vísindafólk.

6. Tað er eisini átaluvert, at henda frágreiðing og hetta tilmæli verður sent út til granskarar til kunningar/hoyringar/viðmerkingar við so stuttari tíðarfreist, sum gjørt er. Hon varð móttikin 3.juni 2005, og hon verður eftir upplýsingunum viðgjørd av myndugleikunum 17.juni 2005.

## Visión

7. Tað eru føgur orð, men neyvan meira, ið brúkt verða um, at visiónin er, at granskaraparkin dregur til sín “know how”, váðafúsan føroyskan og útlendskan kapital, og føroyskar og útlendskar granskarar og onnur við fakligum førleika, umframt at hava miðsavnandi leiklut, stuðla menning og nýhugsan, og skapa eina “synergieffekt” millum íverksetarar, almennar granskingarstovnar og vinnulívið. Í hesum sambandi er tað løgi, at verandi granskingarstovnar og vísindafólk í Føroyum ikki verða tikin upp á ráð soleiðis, at úrslitið hjá stýribólkinum havnar við einum tilmæli um granskarapark bert við lívfrøðiligum innihaldi. Somuleiðis eru vinnulívsfólk ikki nevnd at verða tikin upp á ráð.

## Granskingarøki

8. Til sjálvt tað lívfrøðiliga evnisøkið er at siga, at evnini, sum fokuserað verður uppá, eru í veruleikanum bert tvey, nevniliga fiskur og manna ílegugransking, og tað er, alt tikið við, ein smalur inngangsvinkul at arbeiða eftir í útgangsstøðuni, sum her er gjørt.

   Tað fyrra fakøki (fiskur), kunnu vit siga, er sjálvt støðið undir núverandi vinnulívinum í Føroyum, og kann tað tí vera relevant at granska í og menna soleiðis, at støðið fyri vinnuni verður styrkt. Tað kann tí tykjast løgi, at granskingarstovnarnir í hesum fakøki ikki eru við í planleggjandi arbeiðinum. Eru teir í heila tikið tiknir uppá ráð?

   Tað seinna fakøki (manna ílegugransking) hava vit í Føroyum ikki so nógvar royndir við sum vinnulív, men eisini á hesum øki eru granskarar, bæði føroyskir og við føroyskum tilknýti, bæði á føroyskum og útlendskum granskingarstovnum. Tað vildi verið náttúrligt, at hesir vóru umboðaðir í planleggjandi arbeiðinum, men tað eru teir ikki. Eru teir í heila tikið tiknir uppá ráð?

   Tað liggur sum ein yvirtóni og beinleiðis endamál í hesum tilmæli, at granskingin skal stuðla nýggjum vinnum. Fyrra av teimum viðgjørdu fakøkjunum er ikki ein nýggj vinna. Seinna nevnda fakøkið er nýtt og kundi sum eitt av nógvum møguligum fakøkjum skapt nýggjan vinnumøguleika og eigur sum tað at vera við í einum kjaki um nýggjar vinnumøguleikar. Tað er kortini ringt at síggja tað rætta í at avmarka seg til hesi fakøki burturav uttan meira haldgóða grund við støði í djúptøknari viðgerð gjørd av høgt kvalifiseraðum granskarum og fakfólki.

   Næstan øll tey nógvu virkisøkini í føroyskum vísindaumhvørvi, sum kundu verið ein spíri til nýskapandi vinnuligt virksemi, eru ikki tikin upp á tungu í viðgerðini og tilmælinum. Av áhugaverdum møguleikum fyri Føroyar kunnu t.d. nevnast kunningar- og fjarskiftistøkni (í Føroyum ofta stytt til KT, men internationalt stytt til ICT (ella IT) = International and Communication Tecnology), kolvetnistøkni og jarðfrøði, orkutøkni, instrumenterings- og tóltøkni, og havfrøði bert fyri at nevna nakrar av teimum møguleikum, ið eru.

## Organisering

9. Ítøkiliga organiseringin av granskaraparkini verður lítið viðgjørd, hóast hetta er ein avgjørd fyritreyt fyri, at ætlanin skal eydnast . Nevnt verður, at ein “eldsál” skal vera stjóri, at hølini skulu vera fyrsta floks við el, vatni, gassi, ventilatión, skrivstovum, starvsstovum, auditorium, umsiting, teldunet o.a, alt samalt neyðugt og rættuliga sjálvsagt í einum tílíkum nútíðar byggiprojekti, men lítið sigandi um, hvussu skipanin skal vera. Hølini skulu vera fleksibul, og tað er gott. Men als eingin meting er gjørd av, hvørjar typur av verkætlanum kunnu koma uppá tal og við hvørjum hølistørvi ella øðrum tørvi, t.d. tekniskar trygdarskipanir, royndarannlegg, maskinrúm, neyðstreymsútgerð, o.t.

10. Kostnaðurin av bygninginum er settur til 77 mio.kr., íroknað 7 mio.kr. til forkanning og projektering,  t.e. sjálvur byggikostnaðurin er 23 t.kr/$m^2$ . Hvussu er komið fram til hesa upphæddina? Er hetta undirmett?

11. Tvey ella trý professorat eru skotin upp, mett at kosta o.u. 20 mio.kr árliga, men eingin fígging er til tey. Hvør skal gjalda tey? Skulu aðrir stovnar og vísindafremjandi grunnar drenast, ið vanliga verða brúktir at fíggja verandi gransking?

12. Ynskt og tilrátt verður at koma í gongd sum skjótast og verður árið 2007 nevnt fyri, at fyrsta byggistig skal verða tikið í nýtslu. Hví júst hetta árið er nevnt og annars eingin tíðarætlan, er ikki greitt, men tað er umhugsunnarvert, at eingin skipan ella ætlan fyri einari planleggingarfasu er sett upp, har tey hóast alt rættuliga nógvu granskarar og onnur fakfólk, sum eru í Føroyum ella hava áhuga í vísindaligu menningini av vinnumøguleikunum í Føroyum, kundu komið til orða og sakliga viðgjørt hesa granskaraparkina á einum fakligum og vísindaligum støði.

## Prioritering – ílegugransking fram um aðra gransking?

13. Hóast lívfrøðigranskingar eru nevndar viðvíkjandi fiski, og tað er nevnt, at ítøkiligar ætlanir vóru lagdar fyri, hvussu arbeiðið skuldi leggjast til rættis, er eingin ítøkilig tilráðing um hesa gransking sett upp. Harafturímóti *verður tilrátt, at karmarnir fyri ílegugransking (av fólki) í Føroyum eru komnir uppá pláss frammanundan projektering av føroysku granskingarparkini.* Tað er sera undrunnarsamt, at henda granskingin hevur frammíhjárætt fram um alla aðra gransking. Ílegugransking eigur sjálvsagt eisini at fara fram og eigur tá at verða tilrættaløgd og framd av høgt kvalifiseraðum granskarum, men tað er eingin orsøk til at halda, at hon vil vera eitt fakøki, sum fer at fremja vinnuligan framburð meira enn so nógv onnur fakøki, sum arbeitt hevur verið og verður við í Føroyum. Tað er heldur eingin meting sett upp um møguligt búskaparavkast, sum vildi verið rímuligt, tá ílegugranskingin verður raðfest so frammalaga. Hevur hetta so til endamáls at prioritera ílegugransking hægri enn alla aðra gransking, eisini matvøruframleiðslu og djóraheilsu? Er verkætlanin í veruleikanum ein verkætlan um ílegugransking? Hetta kann í, hvussu so er, gerast úrslitið við hesum uppleggi til handlingsprosess.

## Víðkaður klekingardepil

14. Granskaraparkin verður, sum tað sær út, samanborið við tilsvarandi parkir uttanlanda sambært frágreiðingini organiserað soleiðis, at tað verður møguligt hjá lesandi og granskarum frá lærdum lærustovnum, fyritøkum og vinnulívinum at leiga seg inn í høli, skrivstovur og starvsstovur, í parkini, har allar vanligar installatiónir eru tøkar. Hetta sær út til at vera ein slags víðkaður klekingardepil. Lagt verður upp til, at virksemið í granskaraparkini skal fevna um vitanarflutning og –spjaðin, heilt frá grundgransking, nýttari gransking, nýskapan, vørumenning og stovnseting av fyritøkum. Hetta er sera víttfevnt endamál. Kortini er fakøkið í føroysku parkini avmarkað til lívfrøði.

    Í hesum sambandi verður nevnt, at samstarv eigur at vera við bæði einstaklingar, privatar fyritøkur, almennar stovnar og granskingarumhvørvið í Føroyum og í útlandinum, so sum granskarar á Náttúruvísindadeildini, læknar, Fróðskaparsetrið, Fiskirannsóknarstovuna, Sjúkrahúsverkið, Apoteksverkið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, telefyritøkur, teldufyritøkur, fiskaframleiðsluvirkir, alarar, fiskasølur, kt-tænastuveitarar, umframt útlendsk universitet, heilivágsfyritøkur, kt-fyritøkur vm. Hvussu skal hetta organiserast? Er áhugi í vinnuni og millum granskarar til staðar at arbeiða eftir einum slíkum modelli?

    Tað er ikki eyðsýnt, hvussu hetta skal verða gjørt. Serstakliga væntar tað fyrireikandi kjakið millum verandi vísindastovnar og -fólk, sum er so sera týdningarmikið. Tað tykist at vera tvørrandi innlit í frágreiðingini, hvussu verandi granskingarstovnar virka og serliga kunnu vera gjørdir til at verða til gagn fyri vinnuna. Í veruleikanum kunnu øll endamálini í hesi ætlan verða nádd við teimum íløgum, sum eru skitseraðar, um tær vóru lagdar í verandi stovnar og virksemi, samstundis við víðkaðari stýring – ikki av virkseminum – men av yvirornaða málinum í skipanini av, hvørjar høvuðsleiðir eiga at verða arbeitt eftir. Hetta eigur sjálvsagt at verða gjørt

gjøgnum eitt djúptøki og vítt kjak millum vísindafólk og vinnufólk í Føroyum við hóskandi serfrøðiligari hjálp úr útlandinum.

Samskifti av hesum slag hevur ikki verið, og tað má verða funnist at, at hesin stýribólkur hevur arbeitt uttan at hava havt hetta breiða samskifti við fakkunnleikan og granskingarekspertisuna í Føroyum.

15. Kunningartøkni verður bert nevnt sum neyðugt undirstøðukervi og ikki eitt satsingarøki. Sjálvsagt er tað eins rætt at innleggja atgongd til nýtslu av kunningartøkniútgerð og, at vit skulu hava elektriskan streym. Men tað kundi eins væl verið kunningar- og fjarskiftistøkni (KT ella KFT), sum varð gjørt til satsingarøki. Tað er í hvussu so er eitt sera viðkomandi vísindaligt/vinnuligt fakøki, ið eisini Føroyar kundu gjørt seg galdandi í.

## Granskaraparkir uttanlanda

16. Tað kann neyvan væntast, at yvirskipaða endamálið í frágreiðingini við tilvísing til tilsvarandi granskingarparkir í øðrum londum um regionala menning við at nýta samspælið millum hægri lærustovnar og vinnu, er eins skilagott í Føroyum. Stutt sagt, punktini sum nevnd verða: at handilsliggera granskingar- og kanningarúrslit, at fremja nýskapan í fyritøkum, at menna sambond og samstarv millum gransking og vinnu, at menna nýggjar fyritøkur og at draga nýggjar fyritøkur at sær, forútsetur, at bæði gransking og/ella fyritøkur av hóskandi slag eru frammanundan á høgum støði.

Henda fortreyt er vanliga til staðar í útlendskum granskaraparkum, men ikki í serliga stóran mun í Føroyum. Tað er júst ein veikleiki í føroyska vinnulívinum, at tað í alt ov lítlan mun avsetir resoursir til menning og gransking, og ei heldur hevur ella setir granskingarliga væl skikkað fólk til hetta endamál. Tí er tað, heldur enn bygningar, fyrst og fremst ein hugburðsbroyting hjá vinnulívinum og hjá politikarunum og fyrisitingini, sum skal mennast og gera allar partar positivar fyri íløgum í teir spýrar innan fyri gransking og menning, sum hóast alt eru t.d. í verandi vísindastovnum og í einstøkum virkjum.

17. Tað er rætt, at tvørrandi 1) kanningarstovuhentleikar og 2) váðafúsur kapitalur eru tvær forðingar fyri framburði. Men tann triðja og fjórða orsøkin eru eisini avgerandi og verða als ikki nevndar, nevniliga, at 3)granskingarførleikin, sum hóast alt er, verður ikki tikin upp á ráð, og 4) at rekruteringsgrundalagið er veikt soleiðis, at flestu størv í menningarfunktiónum eru sett við vísindaliga ov veikt funderaðum fólki.

18. Eitthvørt gott samstarv um verkætlan byrjar við, at partarnir tala saman longu áðrenn, at verkætlanin er gjørd ítøkilig. Hetta kann ikki sigast um hesa frágreiðing, sum skal eitast fyri at vera útgangsstøði til eina ta kostnaðarmestu verkætlan í føroyska granskingarheiminum higartil. Í frágreiðingini verða stovnar nevndir: Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetrið, Sjúkrahúsverkið, Fiskirannsóknarstovan, Apoteksverkið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, telefyritøkur, fiskiframleiðsluvirkir, alarar, fiskasølur, kt-tænastuveitarar, umframt universitet og fyritøkur uttanlanda. Men tað er sermerkt við hesum, at einasta universitet í Føroyum er ikki tikið uppá ráð í planleggingini, og neyvan nógv onnur fakfólk frá øðrum vísindastovnum og virkjum eru tað heldur.

## Staðseting og Fróðskaparsetrið sum spjaldur

19. Tað tykist at vera umráðandi hjá stýringsbólkinum at fáa staðsett granskaraparkina í tilknýti til Fróðskaparsetur okkara og almennar stovnar við akademiskum førleikum, og tí vilja hava hana bygdað á Debessartrøð. Umframt vil bólkurin hava stovnsett 2 ella 3 professorat innan lívtøkni, og at tey skulu hava tilknýti til Fróðskaparsetur Føroya, men annars fysiskt liggja í granskaraparkini og bert fáast við gransking og ikki vanliga(?) undirvísing. Samstundis verður alt arbeiðið, sum tað sær út, gjørt uttan nakra sum helst ráðføring við Setrið. Tað sær soleiðis út

til, at einasta orsøkin til at taka Fróðskaparsetrið við í hesa frágreiðing er fyri at "legalisera" hesa eftir føroyskum viðurskiftum stóru íløgu.

20. Tað skal her verða gjørt púra greitt, at, tá tað aðrastaðni hevur víst seg at hava verið ein góð samansjóðing av granskarapark og universiteti, er tað tí, at veruligt samarbeiði hevur verið frá fyrsta degi eisini í planleggingarfasuni. Ofta er granskaraparkin beinleiðis ein fylgja av kommersialisering av avkastinum av einum vísindaligum øki á einum universiteti, og har eitt universitet sjálvt tekur initiativ til stovnseting av henni. Soleiðis er upprunin til "Symbion" granskaraparkina (nevnd í frágreiðingini), at ein bólkur av granskarum við Københavns Universitet tók stig til stovnsetingina av parkini. Hetta "grasrót" initiativið av granskarum, sum skjótt gjørdist fjølmentir við meira enn 100 í talið, høvdu ein felags áhuga í at kommersialisera gransking frá Københavns Universitet. Bólkinum eydnaðist at skapa áhuga og fáa fíggjarligan og politiskan stuðul til stovnsetingina av fyrstu granskaraparkini í Danmark í leigaðum hølum í nánd av náttúruvísindaliga, medisinska og pharmaceutiska fakultetunum á Københavns Universiteti.

## Sløg av granskingarparkum

21. Stýringsbólkurin nevnir ikki og hevur helst ikki gjørt sær greitt, at nógv gransking av granskaraparkum fer fram úti í heimi, og at fleiri kanningar eru komnar til úrslit, ið vísa, at parkirnar ofta ikki lúka uppruna endamálininum: 1) at økja produktivitetin hjá leigarum (eksternum brúkarum) í granskaraparkini, 2) at skapa vøkstur av talinum av arbeiðsplássum í hátøkni vinnuni (high-tech sector), 3) at økja um vøkstur av og dygd í granskingar- og menningartungum vinnuvirkjum tilknýtt parkina, og 4) at skapa menning av sterkum og operationellum bondum millum vinnuvirki, universitetsgransking, almennar granskingarstovnar og aðrar granskingarstovnar.

22. Hetta er nýliga viðgjørt í vísindaligari grein í tíðarritinum Technovation[1]. Greinin hevur hópin av tilvísingum til greinar um royndir og kanningar gjørdar í ymiskum londum. Í greinini verður víst á tvey sløg av granskaraparkum, annað verður nevnt "greenhouse model", og hitt verður nevnt "campus model".

*[1] F.Hansson, K.Husted, J. Vestergaard: "Second generation science parks: from structural holes jockey to social capital catalysts of the knowledge society", Technovation 25, 2005, pp.1039–1049*

## Green-house modellið

23. Dømi um "greenhouse" modellið er tað danska Symbion í Danmark. Hetta er nevnt í frágreiðingini frá stýringsbólkinum. Hetta modellið gongur út frá at skapa eina sjálvstøðuga granskarapark uttan beinleiðis organisatoriskt tilknýti til universitet, men at hon skal verða staðsett tætt við eitt universitet fyri harvið at kunna skapa eitt samband millum vísindafólk og studentar á universitetinum og granskaraparkina.

24. Um tað verður sagt í greinini millum annað: Hóast Symbion hevur høga expertisu í at stuðla nýggjari vinnu, og hóast vinna, ið hevur leigað seg inn hjá Symbion, hevur víða atgongd til væl búnað netverk av eksisterandi vinnufeløgum, er tað ein álvarsligur trupulleiki, at tað hevur vánaligt samband við vísindaligar undirvísingarstovnar í sínum arbeiðsøki. Hóast samband er, er lítið systematiskt og institutionaliserað samskifti við universitet og hægri vinnu- og handilsháskúlar. Hetta eru eginleikar sum ganga aftur í øðrum granskaraparkum við sama modelli.

25. "Green-house" modellið, ið líkist tí føroyska í uppskoti, hevur ikki ment seg sum vónað varð: 1.leigan varð hildin at vera sera stór – oman fyri marknaðarprís, 2. tað hevur ikki eydnast at ment og útnyttað sambandið millum universitetið og granskingarstovnar í København. 3. Tað er

miseydnað at vekja studentaáhuga fyri og rekrutera studentar til at fremja kommersialisering av vísindaligari gransking. 4. Symbion hevur mist stevnumiðið at virka sum bindilið millum universitet, vísindaligu lærustovnarnar og granskigarstovnar øðrumegin og vinnulívið hinumegin, men hevur gingið í rætning av at økja virksemi við leiðsluráðgevandi tænastum til tess at skapa sær sjálvum inntøkur til raksturin. "European Commission" (EC 2002) sigur kritiskt í tráð við hetta í nýliga kunngjørdari frágreiðing um benchmarking, at Symbion í veruleikanum er nærmari ein "business incubator" (kuvøsa) heldur enn, sambært upprunaliga endamálinum, at vera ein granskingarpark ("science park").

Í veruleikanum er vandin við park sum hesari at "institutionalisera og cementera" lágt samstarvsstig millum vísindaligu útbúgvingar- og granskingarstovnarnar og vinnulívið og at halda vísindastovnar og vinnu- og búskaparviðurskifti sundurskild.

## "Campus modellið"

26. Dømi um "campus" modellið er tað bretska campusøki University of Newcastle. Hetta er ikki nevnt í frágreiðingini frá stýringsbólkinum.

27. University of Newcastle tók í 1990'unum tað stig at broyta universitetið til ein samfelagsmátt, sum hevur verið sagt við hesum orðum:" Nýliga er perspektivið broytt við vaksandi denti á, *hvussu universitet eru týðandi táttur í búskaparligari økismenning, sum ein kelda til inntøku og arbeiðsseting og til menning av mentannarlívinum*" ("Recently this perspective has been changing with increasing emphasis on *how universities are a significant force in regional economies, as a source of income and employment, and in contributing to cultural life*"). Universitetið leggur soleiðis dent á at vera í heimsklassa sum granskingarleiddur útbúgvingarstovnur og at vera ein leiðandi faktor í búskapinum, samfelags-, og mentunnarmenningini í norður-eystur Englandi. Her verður lagdur dentur á, at Universitetið ikki bert skal vera ein týdningarmikil máttur, men ein avgerandi drívmegi í landspartabúskapinum.

28. Í University of Newcastle verður gingið burtur frá hugtakinum at flyta tøkni frá universiteti til vinnulív, og heldur ikki verður tosað um, at sínámillum ávirkan millum vinnulív og universitet skal fara fram í serligari granskarapark. Her verður heldur gingið út frá, at *sjálvt universitetið er granskaraparkin* og skal verða útgjørt soleiðis, at vinnulívið hevur atgongd til universitetið. Tá vilja nýggir vinnulívsmøguleikar verða skaptir av týðandi støðd. Soleiðis lýsa teir sjálvir teirra leiklut mótvegis vinnuni: "Sum eitt av leiðandi universitetunum í Bretlandi hvílir okkara góða umdømi á góðsku í okkara gransking, undirvísing og tænastum, sum vit veita vinnulívinum. Vit tillaga okkara serkunnleika til tygara tørv og finna tær røttu loysnirnar til tygara vinnufyritøku, uttan mun til støðd og stað". ("As one of the UK's leading universities, our reputation rests on the quality of our research, training and the services we provide for business and industry. We can match your needs with our expertise and find the right solution for your company - whatever its size or location.")

## Sammeting av granskarapark modellum

29. "Campus" ella Newcastle modellið sum tað er brúkt á University of Newcastle, kann tí sigast at vera ein universitets granskarapark, ið beinleiðis uttan millumlið veitir vinnuni tað vitannarstøðið, sum skal til fyri at menna hana, meðan "greenhouse" modellið, sum tað t.d. er brúkt í Symbion, er ein nýggjur sambindingarstovnur millum *verandi gransking og vinnulívið*.

30. "Greenhouse" modellið kann nýtast, tá tað snýr seg um hugskot, sum longu eru til og hava verið granskað og bert krevja eina menning. Soleiðis lýkur hetta modellið bert at vera ein hjálp í tí seinasta skeiðinum av menningini av produktinum (vøru ella tænastu).

31. Harafturímóti lýkur "Campus" modellið treytina at vera innovativt í allari tí vísindaligu og vinnuligu processini frá upprunaligum hugskoti til endaligt produkt.

**Samanumtikið**

32. Tað er positivt og sjáldsamt, at politiskur vilji nú hevur víst seg verða til at fremja gransking og at royna at gagnnýta gransking til vinnuligt endamál. Eingin ivi skal vera um, at hetta er vegurin fram eisini í Føroyum. Eins og undirritaði viðgjørdi í grein í ársfrágreiðing 2003 Fróðskaparsetur Føroya, er tað avgerandi fyri vinnuligan framburð í Føroyum, at íløgurnar í gransking og menning er minst á hædd við tilráðingarnar hjá OECD, nevniliga 3% av bruttotjóðar úrtøkuni, men skuldu helst verið hægri soleiðis, sum framburðurin í Norðurlondum tykist at ganga. Umframt eigur støðið á hægri útbúgvingum ella universitetsútbúgvingum at vera á eins góðum støði sum í okkara grannalondum, svarandi til íløguna í hægri undirvísing uppá minst 1% av BTÚ.

    Tað er avgerandi, at hesar stóru íløgur verða brúktar rætt, og at vísindaligi og fakligi kunnleikin í Føroyum er aktivt við í at planleggja og fremja hesar íløgur við støði í teimum fortreytum, sum eru her á landi.

33. Gjørda tilmæli "Frágreiðing og tilmæli í samband við stovnsetan av granskarapark" er ein roynd at gera íløgur í gransking. Hon er tíverri mangulfull bæði, hvat viðvíkur visión, vali ella prioritering av granskingarøki og organisatión. Fokuserað hevur verið einsíðugt á eitt modell, ið meira ella minni er kopierað uttan at taka atlit fyri serliga føroyskum viðurskiftum, og at fáir granskarar eru og, at teir, sum eru, ikki verða tiknir við í prosessina.

    Granskaraparkin sum sjálvstøðug eind vil liva sítt egna lív og skapa eitt eyka fyrisitingarligt lið. Hon fer at verða eitt eyka millumlið millum Fróðskaparsetur/granskingarstovnar og vinnulív, og sostatt at skapa størri avstand millum hesar partar, ið ætlaðir vóru at arbeiða neyvt saman. Hetta gevur ein eyka trekleika í skipanini. Hetta vil virka spjaðandi uppá føroyskt vísindaligt virksemi og tess samstarv við vinnulívið.

34. Tað vil tí vera meira skilagott at byggja granskarapark eftir modelli, sum kundi havt líkheit við "campus modellið" við útgangsstøði í Fróðskaparsetri og teimum granskingarstovnum, sum eru í Føroyum, brúka teirra funktiónir, útbyggja nýggjar funktiónir eftir tørvi, og ikki minst at vera opin fyri, at tær neyðugu íløgurnar verða fingnar til vega, samstundis sum neyvt samstarv við vinnulívið verður grundfest í skipanini.

    Hetta vil virka savnandi uppá føroyskt vísindaligt virksemi og fremja samstarv við vinnulívið soleiðis, at hátøkniverkætlanir kunnu verða skaptar og mentar allan vegin frá tí góða hugskotinum til lidnu vøruna ella tænastuna. Við hesum beinleiðis samstarvinum millum vinnu og granskingarstovn/universitet vil "feed – back" eisini vera ein innbygdur táttur soleiðis, at upplýsingar frá vinnulívinum beinleiðis hava ávirkan á vísindaliga virksemi og mótsætt.